Eli hevur einki ímóti at hitta Skála

Í B71 taka teir eina uppgávu í senn, men um tað skuldi komið hartil, at B71 varð annar parturin í endaspæli, so hevði formaðurin einki havt ímóti, at Skála varð mótstøðuliðið

UPPFLYTINGAR-MØGULEIKI
Jóannes Hansen

Eftir sigurin í Leirvík leygardagin er góður møguleiki fyri, at B71 fer at fáa møguleikan at spæla um plássið í bestu deildini, sum teir mistu fyri einum ári síðani. Ta ferðina taptu teir endaspælið ímóti Skála, sum fyri fyrstu ferð flutti upp í bestu deildina.

– Vit hugsa ikki enn um møguleikan at flyta upp. Vit taka eina avbjóðing í senn. Nú hevur tað lagað seg soleiðis, at vit sjálvir hava møguleika at avgera, um vit skulu í endaumfar um eitt pláss í bestu deildini. Í síðsta umfarinum skulu vit spæla ímóti VB. Teir hava staðið seg heilt væl síðani summarsteðgin, og tað verður ivaleysa strevið hjá okkum at vinna øll stigini ímóti teimum. Og um tað fer at eydnast, so verður kappingarárið hjá okkum longt meiri enn eina viku og kanska tvær vikur.

Tað sigur Eli Hentze. Umframt at vera álitið á B71 miðvøllinum, so er veteranurin eisini formaður í B71. Formaðurin í B71 heldur, at tað hevði verið hugaligt at spælt ímóti Skála:

– Í fjør segði eg, at vit vóru favorittar, tá vit spældu endaumfar ímóti Skála. Ta ferðina taptu vit. Um vit koma so langt, og um tað verður Skála, sum vit fara at spæla ímóti, so fari eg at siga, at Skála verður favorittur. Útsøgnin í fjør var grundað á, at vit spældu í 1. deild og Skála í 2. deild. Sjálvandi eigur eitt lið í bestu deildini at vera favorittur ímóti einum liði úr næstbestu deildini. Tí sigi eg, at Skála verður favorittur, um tað kemur har til, at vit skulu spæla ímóti teimum um eitt pláss í bestu deildini, heldur Eli Hentze.

Leggja øðrvísi upp

Í ár er Tom Saintfed úr Belgia venjari hjá B71. Hann er 30 ára gamalur, og longu í 1996 royndi hann seg sum spælari í Klaksvík. Um hann verður venjari komandi ár ella onkur annar, hava teir á Sandi ikki tikið støðu til. Teir ætla sær at bíða við avgerðini, inntil tað verður greitt, um teir skulu spæla í 1. ella í 2. deild.

– Tað er greitt, at vit skulu leggja tað heilt øðrvísi til rættis, um vit megna at spæla okkum aftur í 1. deild. Tað er stórur munur á deildunum. Vit mugu fáa fleiri spælarar aðra staðni frá, og vit mugu venja nógv meiri, enn vit hava gjørt í ár. Páll á Reynatúgvu er aftastur í verjuni hjá okkum. Av góðum grundum venur hann als ikki. Tað hevði neyvan borið til í 1. deild, sigur Eli Hentze, sum framvegis hevur hug at spæla fótbólt á rímuliga høgum støði.

– Eg havi verið seytjan ár á besta liðnum hjá B71, og eg havi framvegis hug at spæla. Men skaðarnir hava verið so nógvir í ár sum ongantíð áður. Tað er troyttandi.

Hvar skulu tit fáa nýggjar spælarar frá?

– Tað er ikki sum at siga tað. Um vit koma so mikið langt, so skulu vit finna fólk, ið eru sinnað at koma henda vegin og at gera eitt arbeiði undir teimum treytum, sum vit liva undir. At finna sovorðnar spælarar er ikki sum at siga tað, heldur B71 formaðurin, sum av royndum er fullgreiður yvir, at tað skulu nógv fleiri pengar til at reka eitt 1. deildarlið, enn tað skulu til, um besta liðið er í næstbestu deildini.

– Men nú stendur VB avbjóðingin fyri framman. Um tað eydnast at vinna á teimum, so fara vit at fegnast um silvurkrónurnar í 2. deild, og so fara vit at gera okkum klárar til endaspæl. Men komandi vikuna fara vit bara at savna okkum um uppgávuna ímóti VB.

– Í fjør segði eg, at vit vóru favorittar, tá vit spældu endaumfar ímóti Skála. Ta ferðina taptu vit. Um vit koma so langt, og um tað verður Skála, sum vit fara at spæla ímóti, so fari eg at siga, at Skála verður favorittur

B71-LÍF 1-2 (1-1):

B71 hevði størri hugflog og tyngd

Tað vóru leirvíkingar, sum byrjaðu betri, men sum fráleið var B71-yvirvágin alt meira sjónlig, og teir vunnu at enda ein uppibornan sigur

2. DEILD
LÍF–B71

Tá leirvíkingar fyrr í summar vóru á Sandi, fóru teir til hús við 3–3 javnleiki. Ta ferðina kendu teir í B71 seg snýttar. Teir hildu ikki, at úrslitið samsvaraði spælbýtið.

Leygardagin fóru sandoyingar úr Leirvík við øllum stigunum. Teir vunnu 2–1, og harvið styrktu teir um møguleikarnar at vinna silvurkrónurnar. Og sandoyingar høvdu onga orsøk at halda, at teir høvdu fingið nakað, sum teir ikki høvdu uppiborið. Størsta partin av tíðini vóru teir leikliga omaná.

Men tað vóru teir á heimaliðnum, sum løgdu bragdligast fyri. Ferðin var høg, og trýstið á B71 málið var stórt. Eftir horna úr vinstru og til handara stólpa stútaði Omar Pálsson inn fyri aftur, og Petur Sjúrðarberg var fyrstur á. Símun Waag Høgnesen, sum hesar seinastu ferðirnar hevur verið í LÍF álopinum, var um reppið at økja um leiðsluna, áðrenn hann noyddist út orsaka av fótlíðsskaða.

So fór ferðin eitt sindur niður. Leirvíkingarnir orkaðu ikki at halda guvuni uppi, og B71 kom alt meiri upp í part. Eli Hentze og Torbjørn Jensen eru ikki tað, sum teir vóru fyri trettan árum síðani, men tá teir fingu frið, so høvdu teir tikið á miðvøllinum saman við Krzystof Radziemski í høgru og skjóta og bólttrygga Símuni Hansen í høgru.

B71 javnaði til 1–1, tá ein stórur hálvur tími var farin. Eftir innkast í høgru til B71 vóru leirvíkingar døllutir. Krzystof Radziemski smekkaði til úr 19 metrum, og bólturin sigldi framvið Karstini Joensen og í málið.

Serliga eftir hetta var B71 greitt omaná, og í 2. hálvleiki var tað bara ein spurningur um tíð, nær teir fóru at leggja seg á odda. Serliga á miðvøllinum var tað heilt galið við eftiransingunum hjá LÍF, og harvið varð verjan fleiri ferðir rend um koll.

B71 hevði møguleikar, eitt nú tá Eli Hentze triggjar ferðir slapp ígjøgnum í vinstru og royndi seg, og eina ferð var miðverjin Ernst Løkjá akkurát ov seinur, tá Eli Hentze úr vinstru legði innfyri tómt mál.

Jónsvein Thomsen mannaði B71 álopið saman við Kristoffuri Vidtfelst, og tá seinna umfarið var hálvrunnið, skoraði Jónsvein Thomsen sigursmálið. Torbjørn Jensen sneiddi framvið tveimum í vinstru, og Jónsvein heilfluktaði sera hegnisliga í handara síðunetið.

LÍF-B71 1-2(1-1)
1-0: Petur Sjúrðarberg
1-1: Radzinski
1-2: Jónsvein Thomsen

EB/Streymur-B36 1-1 (0-0):

B36 misti vónina á Eiði

Tó at B36 hevði yvirvág, so var tað at kalla bert í deyðbóltunum, at verjna hjá EB/Streymi hevði trupulleikar av frákoyrdu meistarunum

Hóast yvirvág, so fingu meistararnir B36 bert javnleik á Eiði, og nú er mest sum greitt, at talan ikki verður um heiðursmerki hjá teimum í ár

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Vit skrivaðu í leygardagsblaðnum, at fyri bæði EB/Streym og B36 var galdandi, at teir sunnudagin skuldu royna at fáa fótbóltslagið upp, eftir at gongdin seinnu umførini hevði verið eitt sindur tung hjá báðum. Ikki minst hjá B36, sum eftir øllum at døma misti silvurið úr eygsjón ta ferðina, og nú sunnudagin mistu teir so helst vónina fyri heiðursmerkjum yvirhøvur.

Talan gjørdist nevnliga um javnleik á Eiði sunnudagin, og tó at árstalsfelagið aftur í dag man íðka seg, so er tað máltalvan, sum er avgerandi, tá úrtøkan fyri dystin skal gerast upp.

Long yvirvág

Tað var nevnliga B36, sum fyri tað allar mesta hevði eina greiða yvirvág á Eiði sunnudagin. Frá fyrsta bríksli royndu teir at leggja eitt stórt trýst oman móti heimamálinum, og tó at eingir beinleiðis opnir møguleikar spurdust burturúr, so lúrdi vandin alla tíðina, og nógvu deyðbóltarnir av horna- og frísparksstøðum voldu heimaliðnum alskyns trupulleikar hesa løtuna.

Hinvegin var eisini greitt, at hóast hetta, so royndu teir hjá EB/Streymi alla tíðina at liggja framvið, tá møguleikin beyðst í kontrafasuni, og einar tvær ferðir gjørdust teir eisini mest sum leysir við Magnusi Poulsen, sum hesa ferð vardi málið hjá B36, uttan at hetta gav úrslit.

Í seinna hálvleiki helt greiða yvirvágin hjá gestunum fram, men leingi var tó líkt til, at tað ikki skuldi spyrjast nakað serligt burturúr hesum. Ikki fyrr enn eitt korter var eftir at spæla, eydnaðist loksins at fáa hol. Ein langur bóltur varð sendur niðan móti John Petersen, men verjan tóktist tó at hava tamarhald á, tá bólturin skuldi stútast burtur. Hann kom tó ikki longur enn til føturnar á Kenneth Jacobsen, og millum vínir og fíggindar fekk hann skot á, so bólturin fann vegin til meskarnar, og mundu havnarmenninir halda, at stigini vóru í pottinum.

Lumpaðu við frísparki

Eftir málið royndi EB/Streymur at umskipa liðið nakað, fyri at fáa meira álopsspæl í. Sorin Anghel hevði alla tíðina verið ytsti miðvallarin í vinstru, men hann varð nú fluttur niðan, og spakuliga fekst nakað meira av tyngd í álopi, hóast møguleikarnir ikki gjørdust fleiri.

B36 tóktist at hava tamarhald á støðuni, men triggjar minuttir fyri leiklok fekk EB/Streymur kortini javnað. Fleiri ferðir í ár hava teir sýnt stórt hegni í frísparksstøðum, har tað serliga hevur verið ein ávíst kombinatión, sum hevur hepnast væl. Hendan varð eisini royndi fyrr í dystinum móti B36, og ivaleyst hildu teir svørt hvítu, at hon skuldi roynast aftur móti dystarenda. Í øllum førum tóktist múrurin at hugsa nógv meira um Ronnie Samuelsen enn bóltin, tá Ronnie royndi at renna seg leysan, og so smekkaði Eyðfinn Joensen bara til. Bólturin tók í múrin á vegnum, og tó at málverjin hevði hondina á, so var hetta ikki nóg mikið at forða útjavningini.

Mistu heiðursmerki

Eftir øllum at døma, so bar javnleikurin við sær, at B36 nú fer at standa uttan heiðursmerki, tá árið er liðugt. Fimm stig eru nú upp til NSÍ og KÍ, og tað skal vera løgið, um tey bæði ikki fáa okkurt stigið burtur úr teimum báðum seinastu umførunum, og hartil hava B36 sjálvir sera trupla uppgávu, tá teir komandi vikuskifti skulu spæla í Gøtu.

EB/Streymur slapp sær hinvegin enn eitt stig burtur frá niðurflytingarvandanum, og tó at matematiska óvissan enn er til staðar, so skal tað vilja heilt illa til, um teir skulu gerast partur í nøkrum upp- og niðurflytingardysti. Tað kann neyvan roknast við, at Skála ella TB skulu vinna báðar dystirnar, sum eftir eru, og í so máta er støðan hjá EB/Streymi helst hin sama, sum hon var undan dystinum, men tá var hon nú heldur ikki so galin. Tilveran í deildini tykist í øllum førum bjargað, og tað var væl eisini tað, sum teir á samansetta liðnum ætlaðu, tá farið varð undir fyrireikingarnar til árið.

Dysturin í tølum:

EB/Streymur-B68
1-1 (0-0)
0-1: Kenneth Jacobsen 75
1-1: Eyðfinn Jacobsen 87
Dómari: Oddmar Andreasen

EB/S: Gunnar á Steig – Hallur Jacobsen, Knút Vesturtún, Andrzej Pacek, Eyðfinn Joensen – Marni Djurhuus, Ronnie Samuelsen, Jákup Martin Joensen, Sorin Anghel – Jón Sigurð Gleðisheygg, Teitur Joensen

B36: Magnus Poulsen– Arnbjørn Danielsen, Egil Zachariasen, Jens Kristian Hansen – Jákup á Borg, Klæmint Matras, Julian Johnsson, Kenneth Jacobsen – Bárður Mortansson, John Petersen, Magni á Lakjuni

VB-KÍ 7-2 (3-1):

VB eitt ár aftrat í 2. deild

VB tryggjaði sær pláss í aðru deild eitt ár aftrat, eftir tryggan sigur á KÍ. Birgir Jørgensen skoraði heilar fýra ferðir fyri VB.

2. DEILD
Bjartur Nolsøe

Tað sá onki út hjá VB tá seinna hálva av kappingini byrjaði í august. Tá lá liðið aftast við 6 stigum, 4 upp til HB á næstaftasta plássið. Men síðani hevur gingið javnt framá, og í seinnu helvt eru 16 stig komin í hús. Klaksvíkingar hava alt ár ligið toluliga væl fyri, og hava staðið seg væl á heimavølli.

Eftir úrslitini leygardagin hava bæði VB og KÍ tryggjað sær pláss í deildini aftur næsta ár.

Bæði liðini eru 4 stig frammanfyri HB, og tá Sumba og NSÍ skulu møtast í seinasta dystinum næsta vikuskiftið, kann bert tað eina av hesum liðunum koma uppá 22 stig.

Málríkur dystur

Dysturin í Vági gjørdist málríkur og fekk eisini tann rætta vinnaran. VB var betra liðið so at siga allan dystin, og í hálvleikinum var støðan 3-1 til heimaliðið. KÍ var ikki so væl mannað henda dagin sum onkran av teimum seinastu dystunum.

Robert Cieslewicz sum ikki hevur verið á 1. deild seinastu dystirnir, og hesaferð royndi seg á næstbesta liðnum, legði VB á odda miðskeiðis í fyrra hálvleiki.. Hann fylgdi upp uppá ein bólt tá Birgir Jørgensen hevði skallað á stongina. Løtu seinni økti Birgir Jørgensen til 2-0, tá hann bleiv spældur leysur av Robert. Men minuttin eftir hetta, gav veteranurin hjá KÍ Olgar Danielsen, KÍ vónina aftur tá hann minkaði um munin til 2-1, eftir at verjan hjá VB ikki fekk bóltin burtur..

Henda støðan helt sær til síðsta minuttin í fyrra hálvleiki, tá vágbingar aftur fingu mál og løgdu seg á odda 3-1. Aftur hesuferð var tað Birgir Jørgensen sum var á blettinum.

Avgerðin fellur

Vónin sum klaksvíkingar hava havt til at fáa eitt úrslit við sær úr Vági, bleiv sløkt tíðliga í seinna hálvleiki. Longu í fyrsta minutti skoraði Birgir Jørgensen sítt triðja mál til 4-1, og so var ongin vegur aftur hjá KÍ.

VB fekk trý mál aftrat við stuttum millumbili, og var eitt skifti á odda 7-1. Fyrst var tað Robert Cieslewicz sum skeyt mál til 5-1, Birgir Jørgensen økti til 6-1 og Sigmund Mikkelsen setti punktum fyri málskjótingini hjá VB, tá John William í KÍ-málinum fór skeivur av bóltinum, sum endaði hjá Sigmund sum skeyt hann inn í málið.

Fáar minuttir fyri leiklok fekk KÍ pyntað um úrslitið, tá Marius Nystrøm fekk seinasta fótin á bóltin.. Endaliga úrslitið gjørdist sostatt 7-2 til VB.

Í næstu viku skal VB spæla á Sandi, meðan KÍ tekur móti HB. Bæði VB og KÍ eru sum sagt tryggjaði eitt ár aftrat í deildini. Hinvegin hava bæði B71 og HB nógv at spæla fyri, og kanska er tað tí ein fyrimunur hjá teimum, at ikki so nógv stendur uppá spæl hjá VB og KÍ.

Dysturin í tølum:
VB-KÍ 7-2(3-1)
1-0: Robert Cieslewicz
2-0: Birgir Jørgensen
2-1: Olgar Danielsen
3-1: Birgir Jørgensen
4-1: Birgir Jørgensen
5-1: Robert Cieslewicz
6-1: Birgir Jørgensen
7-1: Sigmund Mikkelsen
7-2: Marius Nystrøm